## Stutttíðarmissións møguleikar 2010

| Stað og heiti | Dato | Aldur |
|---|---|---|
| London<br>Turning point | Tíðarskeið 12/6—14/8<br>6 ymisk dato | 18 + |
| Suður Afrika<br>HM 2010 | Tíðarskeið 7/6-12/7<br>3 ymisk dato | 18 + |
| Asia, Out of the Comfort Zone<br>Outreach ymisk lond | 10/7-15/7<br>15/7 og 1-2 vikur fram | 18 + |
| Brazil<br>Do something now | 22/7—31/7 | 18 + |
| Rom, Italia<br>Transform 2010<br>Outreach ymisk lond | 19/7—23/7<br>24/7 og 1-6 vikur fram | 18 + |
| TeenStreet | 29/7—04/8 | 13—18 |
| Rumenia | 01/8—10/8 | 18 + |
| Russland | 02/8– 16/8 | 18 + |
| TiM-Teens in Mission | | |
| Danmark | 04/8—10/8 | 16—18 |
| Holland | 04/8—12/8 | 15—18 |
| Ongland | 04/8—14/8 | 16—18 |
| Týskland | 04/8—11/8 | 15—17 |
| Moldova | nógv ymiskt dato | 18 + |
| Chile, Next Adventure | 23/10—13/11 | 50 + |

OM Føroyar, postsmoga 3221, 110 Tórshavn
www.om.fo, info@fo.om.org
Karl tlf. 217551, Anita tlf. 597842

# STUTT TÍÐAR MISSIÓN

## Global Challenge

# 2010

OM FØROYAR

Tað er eitt hav av møguleikum innan stutttíðarmissión hjá OM. Vit vilja her í stuttum greiða frá nøkrum tilboðum sum, OM bjóðar fram í 2010. Hevur hetta tín áhuga, so vilja vit fegin leiðbeina víðari.

**Transform 2010** er tað heilt stóra summar tiltakið, sum OM bjóðar fram í 2010. 450 milliónir menniskjur búgva í teimum 21 nútímans londunum rundan um Miðalhavið. Tær kristnu røturnar eru sterkar har, men tó eru tað fá, sum kenna Jesus. Tiltakið byrjar við eini venjingarstevnu í Rom í Italia. Í 5 dagar verður undirvísing, tilbiðjan og venjing. Stevnan í Rom er í døgunum 19. – 23. juli.

Aftaná hesar 5 dagarnar verður so farið til tað landið, sum ein hevur valt til outreach land. Og har eru nógvir møguleikar. Ein møguleiki er at verða í Italia, tað er nokk tann bíligasta loysnin, men so eru tað lond sum Grikkaland, Frankaríki, Kosovo, Bosnia Herzogovina, Albania, Malta, Tunesia, Portugal, Ísrael, Turkaland og nógv fleiri. Tað er eitt sindur ymiskt hvussu long outreachini eru, men tað liggur ímillum 1 viku og 6 vikur. Tilmeldingarfreistin er 30.apríl. Les meira á www.transform.om.org

**Do Something Now** kallast tiltakið, sum OM bjóðar fram í Brasil. Við drama, tónleiki, list, ítrótti og øðrum verður evangeliserað fyri gøtubørnum, fátækum og heimleysum menniskjum. Arbeitt verður saman við einari lokalari samkomu. Tiltakið er í døgunum 22. juli til 31. juli. Tilmeldingarfreistin er 22. juni.





**Out of the Comfort Zone** er enn eitt spennandi summartiltak sum OM kann bjóða fram í Asia. Tað búgva 2 milliardir menniskju í Eystur Asia og tey flestu hava ongantíð hoyrt um Jesus. Out of the Comfort Zone byrjar í Malaysia við einari 5-daga venjingarlegu. Síðani verður farið út at evangelisera í 10-17 dagar, og har kann ein velja ímillum nógv ymisk lond í Asia –so sum Japan, Taiwan, Fillipinirnar, Malaysia, Cambodja og onnur lond. Out of the Comfort Zone byrjar 10. Juli og er so 2-3 vikur fram, alt eftir hvørjum landi tú ert í. Tilmeldingarfreistin er 31. mai.



**Logos Hope.** Tey flestu, sum fara umborð á Logos Hope, fara við skipinum í 2 ár ella meira, men 2 ferð um árið er møguleiki at koma á eitt Step program umborð á Logos Hope.
Eitt Step program er umleið 3-6 vikur.

**Turning Point** er eitt outreach ímillum muslimar í London. Tú fært møguleika at bera gleðiboðskapin til muslimar, sum óiva ikki hava møguleika fyri at hoyra ella lesa evangeliið í heimlandinum.
Turning Point er í tíðarskeiðinum 12. juni til 14. august. Veljast kann ímillum 6 ymisk dato og longd á outreach. Tilmeldingarfreistin er 4. juni.



**Russland—Siberian Extreme.** Eitt sera spennandi tiltak í døgunum 2. august til 16. august, sum teir fyrstu 2 dagarnar heldur til á tí nýggja lærisveinaskúlanum hjá OM í Novosibirsk. Síðani verður ferðast til Rubsovsk, har arbeitt verður saman við einari lokalari samkomu í 5 dagar. Teir síðstu 5 dagarnar verða á eini legu fyri børn í eini bygd í Sibirien. Tilmeldingarfreistin er 15. mai.

**Rumenia, bicycling Outreach.** Missión og motión í einum. Farið verður á súkklu runt til bygdir í Rumenia at boða gleðiboðskapin. Tiltakið er 01. til 10. august. Tilmeldingarfreistin er 1. juni.

**Love Moldova.** Arbeitt verður á einum barnaheimi og millum gøtubørn. Tiltakið er ymisk tíðarskeið gjøgnum alt árið.

**Suður Afrika, HM í fótbólti.** Eitt spennandi tiltak fyri øll fótbólsáhugaði. Arbeitt verður saman við einari lokalari samkomu við at boða gleðiboðskapin ímillum lokalfólkið og tey, sum eru komin at njóta HM í fótbólti. Veljast kann ímillum 3 ymiskar fráferðir í tíðarskeiðinum 7. juni til 12. juli. Tilmeldingarfreistin er 30. apríl.

**Chile Next Adventure** eitur tiltakið fyri tey, sum eru 50 ár ella eldri. Í 3 vikur verður ferðast runt í Chile, har møguleiki er at síggja nógvar ymiskar missións møguleikar og sjálvsagt eisini tað vakra landið. Spennandi seminar og bíbliuundirvísing er eisini á skránni. Tiltakið er 23. oktober til 13. november.

Tú kanst lesa eitt sindur meira um tey ymisku tiltøkini á www.om.fo.
OM bjóðar eisini aðrar møguleikar fram, so fanst tú ikki tað tú leitaði eftir, so vilja vit fegin tosa við teg og hjálpa tær víðari. Tú ert meira enn vælkomin at seta teg í samband við OM Føroyar.